# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eldur í koluni

So varð, sum væntað, eldur í koluni. Atfinningarnar regna niður yvir Edmund Joensen fyri ES initiativið. Ein skuldsetur hann fyri undirgravandi virksemi og kravt verður, at løgmaður og uttanríkisráðharrin taka stig til at steðga Edmundi fyri at bøta tann skaða, sum Edmund Joensen hevur framt. Ein annar, formaðurin í uttanlandsnevndini, metir, at initiativið er tað sama sum at mæla til at Føroyar at fara inn í ES umvegis Danmark og harvið avreiða valdið hjá løgtingi og landsstýri. Hann ger vart við, at samgongan, sum varð skipað fyri at skapa stabilitet, má nú finna síni bein og fara seriøst til verka. Tað er umráðandi, at signalini úr Føroyum eru greið, so vit verða tikin fyri fult úti í heimi.

So mikið í heilt stuttum um nakrar fáar av atfinningunum. Tað var sjálvsagt at vænta, at reaktiónin fóru at vera ógvuslig og í grundini er tað væl skiljandi. Vit hava í Føroyum sera fastlæstar politiskar strukturar, har hvør ansar eftir sínum og har hvør verjir og røkir sítt kongsríki. Tað er eisini, sum vit gjørdu vart við í gjár, sera óvanligt, at ein parlamentarikari tekur uttanríkispolitisk stig, tí uttanríkispolitikkurin hevur vanliga verið vøllurin hjá útinnandi valdinum. Hinvegin kemur tað fyri í øðrum fólkaræðiligum skipanum, at parlamentarikarar bróta ís millum lond og samgongur, tá støður eru fastlæstar. Tann sera ógvusliga reaktiónin hjá ávísum politikarum átti tí at verði dempað eitt sindur, og heldur átti verði hugt at, hvør orsøkin er til tiltak Edmunds, og hvussu uttanríkisráðið og uttanlandsnevndin kunnu gagnýta hansara initiativ. Hetta verður sagt við tí í huga, at Edmund veruliga hevur skilt ES kommisserin rætt. Hevur kommisserurin, sum nú verður rikið uppundir, als ikki málborið seg, sum Edmund læt ljóða í gjár, so hevur fólkatingsmaðurin ein sera stóran trupulleika.

Edmund hevur tikið eitt so at siga privat diplomatiskt stig mótvegis ES. Vit kenna ikki hansara motiv, men tað skuldi ikki undra, um hann, eins og so mangur, hevur mist tolið, tí lítið og einki er hent í samstarvinum við ES. Vit hava ein avoldaðan fríhandilssáttmála, sum ongar menningarmøguleikar gevur samstarvinum. Føroyar eru eitt av heilt teimum fáu europeisku londum, sum ikki samstarvar við ES innan t.d. gransking, útbúgving, mentan og mangt annað. Uttan mun til, hvussu dugnaligir og ídnir allir partar hava verið, so hava vit ikki fingið vøruna. Við hesum í huga kann initiativ Edmunds metast sum ein provokatión til tess at fáa gongd á eitt mál, har einki tykist henda, alt meðan orkan verður nýtt á ein hátt, sum mangan má undra almenningin. Tá alt hetta er sagt, so má ásannast, at Edmund sjálvandi átti at kunnað landsstýri, uttanlandsnevnd og uttanríkisráðharra, áðrenn hann fór á fund við ES kommiserin, so tað slapst undan øllum rokinum.

**Sosialurin**

## Áheitan til Heðin Mortensen og restina av Tórshavnar kommunu

HERGEIR STAKSBERG
hrgar@hotmail.com

**Eg havi eitt hugskot til tykkum. Hugskotið er ógvuliga einfalt og kann vera við til at prógva, at Tórshavnar kommuna veruliga leggur nakað í tey veiku í samfelagnum og virðir allar borgarar eins høgt**

Gongugøtan og miðbýurin í Havn er at rokna sum steindeyður ella í minsta lagi í koma. Og ein orsøk er parkeringsøkið yvirav býráðnum á vaglinum. Eitt parkeringsøki er ikki akkurát tað lívligasta staðið í verðini, men tað er óluksáliga hent at hava hjá fólki... sum hava handikapp.

Men har er eitt problem. Hvussu ofta sært tú ein bil, sum hevur eitt handikapp skelti í bilrútinum standa parkeraðan á einum handikapp plássi? Handikapp plássið er næstan altíð tikið, men tað er tí generelt hava lært at skíta á tey. Hetta er partvís orsakað av signalinum, sum kommunan sendir út til fólkið. Og tá vit menniskju kunnu venja okkum við alt, so er bara at koma við einum boðskapi nóg ofta, tí til seinast skal fólkið nokk byrja at trúgva tí. Hetta eru "hópoyðingarvápnini" í Irak eitt gott dømi um.

Hví er tað altíð 1 útav 10 ella 1 útav 100 plássum, sum er ognað teimum við handikapp? Vil samfelagið vísa, at tey eru "eitt sindur" góð við tey? Og harvið reinsa samvitskuna við at geva teimum ein lítlan bita av kakuni? Hetta minnir um fólk, sum senda ein 100 kr. seðil til eitt barn í Afrika, so tey kunnu anda lætt aftur, hóast tey lættliga høvdu kunna givið fleiri 1000 kr. burtur.

Ná, nú er nokk prædika... her kemur hugskotið. Hví ikki gera øll parkeringsplássini á vaglinum til handikapp parkeringspláss? Um vit taka Tórshavnar kommunu, so mann hon fevna um uml. 20.000 fólk. Um vit siga, at á vaglinum eru uml. 12 parkeringspláss. Eg vildi mett (ella rættari: eg veit), at tað eru fleiri enn 1/1000, sum er handikappaður, men taka vit 1/1000 sum dømi, so haldi eg tað minsta mann kundi gjørt var, at mann gav teimum rímiligar umstøður at parkera. Serliga mitt í býnum!. Sum støðan er nú, so virkar tað sum mann vil hava fólk við handikappi at blíva verðandi í síni holu. Um tey ikki koma úr teirra holum, so gera tey heldur ikki vrøvl. At ignorera og tiga tey burtur... tað má vera tað lættasta. Hvussu kiksað er tað ikki, tá tað hevur størri týdning, at geva borgarstjóranum sítt egna heilaga parkeringspláss, heldur enn at geva fólki, sum hava tørv á eins góð rættindi til. Báðir partar gjalda kommunu skatt... ikki sannheit? Orsaka moral prædiku nr.2. Tað glapp.

Hetta uppskotið krevur ikki meir enn eina spann av máling, so har skal ongin dýrur arkitektur blandast uppí... so tann umberingin riggar ikki.

Men ja, hvat siga tit, sum sita við valdið? Er hetta nakað, sum tiltalar tykkum? Um ikki, so vil eg fegin vita hví?

Hví ikki ganga undan og vísa á, at mann veruliga leggur nakað í tey handikappaðu? Lat tey, sum hava størstan tørv á einum parkeringsplássi fáa tað... og set so teg sjálvan til viks í teir max 5 min. tað tekur at ganga.

Tað er upp til tykkum, um tit velja egoismuna/dovinskap/líkasælu ella veruliga at ganga undan sum kommuna, tá tað ræður um at vísa teimum veiku í samfelagnum, at tey eisini skulu hava loyvi til at vera her.

ps. Eg vóni veruliga ikki, at nakar, sum stillar upp er so ynkeligur, at viðkomandi fer at brúka hetta uppskotið sum valagn.

pps. Eg búgvi uttanlands og lesi ikki tey føroysku bløðini. Um nakar hevur eitt aftursvar, so hevði tað verið gott, um viðkomandi kundi sent tað til hrgar@hotmail.com.

## Eldraøki



INGA DAHL
Býráðslimur
Valevni hjá Fólkaflokkinum til Tórshavnar Býráð

Eldraøki eigur at vera lagt út til kommunurnar at umsita. Ójavnt er hvussu nógv ellis- og røktarheimspláss eru í ymsu kommununum í landinum, og tí er ójavnt hvussu stórur tørvurin er í hvørjum øki sær. Í Tórshavnar Kommunu vænta ellis- og røktarheimspláss, at bíðilistin á 375 fólk sigur nógv um tann tørv sum borgararnir hava.

Vit hava sæð at kommunurnar kring landið megnaðu at fáa skil uppá barnagarðsøki, tá tað varð lagt út til kommunurnar. Tað er tí onki at bíða eftir eisini at leggja eldraøki út til kommununar at umsita, tí kommunurnar megna at umsita eldraøki.

Vit eiga at byggja ellis- og røktarheim í Tórshavnar Kommunu, ongantíð ov skjótt. Tað eru nógvir borgarar sum kunnu fáa gagn av nýggjum ellis- og røktarheimsplássum í kommununi.

### Gjald fyri valgreinar

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 95 oyru + MVG fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórin**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støđd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.